LØGTINGS VAL 2015

Búskaparmenning

Ein sterkur fólkaskúli er fyritreytin fyri javnstøðu og javnrættindum. Ein veikur fólkaskúli skapar gróðrarlíkindi fyri mismuni og mistrivnaði, og úrslitið verður eitt fátækari samfelag.

Magnus Rasmussen
Valevni Sambandsfloksins til løgtingsvalið



Føroyski búskapurin kann sveiggja nógv og tí er neyðugt at føra ein fíggjar- og búskaparpolitikk, sum skapar stabilitet og langtíðarjavnvágir. Vit eiga at ansa eftir rakstrarútreiðslunum hjá landskassanum, soleiðis at hesar ikki vaksa meira enn hægst neyðugt, og sum inntøkur eru til.

Í góðum tíðum eigur landskassin at halda aftur við útreiðslum, meðan landskassin í ringum tíðum eigur at fremja virksemisskapandi íløgur o.a.

Vit eiga at gjalda niður skuld, tí skuldin er tyngjandi fyri okkum, og svarar til at seta okkara frælsi í pant – skuldin er í løtuni yvir 6 mia.kr brutto. Harafturat koma rentuútreiðslur av skuldini uppá einar 120 mió.kr. árliga. Eydnast okkum at tálma rakstrinum og gjalda niður skuld, so eru góðir møguleikar fyri at gera fleiri almennar íløgur – íløgur, sum samfelagið hevur fyri neyðini og sum tí eisini fara at gagna okkum øllum.

Seinastu árini hevur gingið framá í føroyska búskapinum, og tað er gott, men eisini neyðugt. Arbeiðsloysið er sera lágt í løtuni. Flestu vinnugreinar hava framgongd, og hetta stimbrar búskapargongdina. Henda góða gongd eigur at halda fram og økjast enn meiri, og tað kunnu vit gera við m.a. at syrgja fyri, at vinnan fær langtíðartryggjaðar karmar, soleiðis at hon kann leggja ætlanir fram í tíðina.

Sjálvt um gongdin er góð nú, so vísir Búskaparráðið á, í eini av síni frágreiðingum, at búskaparliga haldførið í almenna geiranum er vánaligt. Hetta er nakað, sum eigur at verða tikið í størsta álvara, tí tað er ikki nóg gott, at tað gongst væl í dag, tá vit vita, at stórar búskaparligar avbjóðingar liggja fyri framman næstu árini. Her mugu tøk takast og neyðugt verður at gera tillagingar og á øllum økjum í samfelagnum, og nýskipanir, sum tosað hevur verið um í áravís muga gerast veruleiki nú.

So eitt nývalt løgting eigur beinanvegin at leggja eina langtíðarætlan, sum tekur hædd fyri teim avbjóðingum, sum m.a. Búskaparráðið vísir á. Leggjast eigur upp til at fáa eina breiða undirtøku fyri hesum, til tess at kjølfesta ætlanina so væl sum til ber.

Gott val!

KJAK

Kunnu 86% av føroyingum taka so feil?

Regin Eikhólm



Síðani 1996 hava føroyingar búsitandi í Føroyum kunna valt, um teir vilja hava eitt grønt føroyskt pass ella eitt reytt danskt/føroyskt EU-pass. Tað reyða danska/føroyska EU-passið gevur føroyinginum javngóð rættindi í EU, samstundis sum hann varðveitir øll tey føroysku serrættindini í Føroyum.

Hesi seinastu árini hava um 85% av føroyingum búsitandi í Føroyum valt tað reyða danska/ føroyska EU-passið. Í 2014 valdu 85,8% av føroyingum tað reyða EU-passið og 14,2% valdu tað grøna føroyska passið, sambært danska ríkspolitinum.

Oman fyri standandi tøl vísa, at 86% av herbúgvandi føroyingum velja at njóta EU-frælsið innan fyri ríkisfelagsskapin.

Grønland er ov fáment til fullveldi

Í Sosialinum 1. sep. 2009, stóð at lesa um bretska búskaparprofessaran, Anne Sibert, har hon bæði í skrivt og talu vísir á, at Grønland er ov fáment til fullveldi. Hon sigur, at nógv bendir á, at í smáum samfeløgum hevur persónligt samband ov stóra ávirkan á politisku skipanina, og tað elvir til nepotismu/vina- og kenningapolitikk og korruptión. Umframt tað at fáment samfeløg eru ov viðkvom á mangan hátt, tað veri seg fyri størri sveiggjum í búskapinum ella í náturufyribrygdum.

Størri eindir megna meira

Tað er ikki nakað nýtt, at størri eindir megna meira enn pinku eindir. Kommunusamanlegging er eitt gott dømi. Tórshavnar Kommuna megnar mangt, sum tær smærru kommunurnar bert kunnu droyma um, og tí vilja fólk helst til Havnar.

Ríkisfelagskapurin er eisini eitt gevandi dømi um eina størri eind við margfeldni og møguleikum hjá tí einstaka frælst at velja. Útvið ein triðingur av øllum føroyingum hevur valt at búseta seg í Danmark, 70-80% av teimum lesandi velja Danmark. Føroyingar sum av ávísum grundum føla Føroyar ov trongar og stigmatiserandi finna frælsi í tí størra og meira toleranta umhvørvinum í DK. Og tá vit ferðast úti í heimi, kunnu vit við heimarætti brúka øll diplomatisk bond/avtalur, ið Danmark hevur við flest øll lond.

Føroyar sum fullveldi

Skulu vit trúgva oman fyri nevnda bretska búskaparprofessaranum, Anne Sibert, so vil eitt fáment Føroyar sum fullveldi verða eitt eldorado fyri nepotismu/vina- og kenningapolitikk og sera viðkvæmt fyri sveiggjum í búskapi og tilfeingi.

Neyðugt við føroyskari meistaraútbúgving

Tíðin er búgvin til at hava eina meistaraútbúgving í Føroyum. Hendan útbúgving skal tryggja at handverksmeistarar kenna regluverk um bygging, umframt tað handilsliga í at reka eina fyritøku, so sum roknskap, mvg og verkætlanarstýring

Føroya Handverksmeistarafelag
Marius Thomassen

At byggja síni sethús er fyri tey allarflestu tann størsta og týdningarmesta íløgan í lívinum. Tí er tað sera umráðandi at tann, sum byggir húsini, umframt dugnaskap í handverki, kennir til regluverkið innan økið, umframt eisini hevur førleika í verkætlanarstýring. Neyðugt er at tryggja, at fólk kunnu lata síni sethús byggja og vita at arbeiðið er framt av einum løggildum handverksmeistara. Fyri at kunna tryggja slíka góðsku, er tað alneyðugt við eini meistaraútbúgving, sum, saman við royndum á økinum, gevur handverksmeistarum løggilding.

Marknaðaratgongd

Í grannalondum okkara finnast slíkar útbúgvingar longu. Eitt nú er tað eitt krav í Íslandi, at ein handverksmeistari er løggildur fyri at kunna standa fyri arbeiði, meðan meistari er eitt vart heiti í Noregi, har tað krevur løggilding fyri at kunna kalla seg meistara. Tískil hevur tað alstóran týdning, at man í Føroyum fer undir at skipa eina meistaraútbúgving, sum stendur mát við tær útbúgvingar, sum eru í grannalondum okkara. Gera vit tað, fáa føroyskar handverksfyritøkur eisini atgongd til marknaðirnir í hinum norðanlondunum. Sum støðan er í dag, hava norskar og íslendskar fyritøkur fría atgongd á føroyska marknaðin, meðan føroysku handverksmeistararnir hava sera trupult við at bjóða seg fram á teirra marknaðum, av tí at teir ikki hava líknandi meistaraútbúgving.

Trygdin er fyrimunurin

Nógvir eru fyrimunirnir við at fara undir eina meistaraútbúgving, har trygdin hjá vanligum fólki, sum lata síni sethús byggja, hevur størsta týdningin. Ein løggildur handverksmeistari hevur, umframt handverkið, eisini tað handilsliga í lagi. Um fólk ynskja at byggja síni hús sjálvi, skulu tey sjalvsagt kunna tað undir egnari ábyrgd. Um tey hinvegin biðja eina fyritøku um at byggja húsini, skal meistarin vera løggildur við royndum á økinum og eini meistaraútbúgving. Hetta tryggjar, at fólk fáa trygd fyri at teirra hús liva upp til galdandi regluverk og nútíðarkrøv annars. Samstundis tryggjar meistaraútbúgvingin, at handverksmeistarin hevur neyðugu handilsligu førleikarnar til at gjøgnumføra ta verkætlanina, sum tað er at byggja eini hús.

Føroyskar fyritøkur klárar at gera tunnlarnar

Føroya Handverksmeistarafelag

Sum áður fráboðað tekur Føroya Handverksmeistarafelag undir við Ráðgevarafelagnum og mótmælir, at P/f Eysturoyar- og Sandoyartunnilin hevur gjørt avtalu við norskt felag um forprojektering av Eysturoyartunnlinum, uttan so mikið sum at bjóða arbeiðið út. Tað er eingin ivi um, at føroyskar byggifyritøkur megna at útføra arbeiðið.

Slíkar verkætlanir eru serstakar ikki bara í Føroyum, men allastaðni. Tí er hetta ein gyltur møguleiki hjá føroyskum fyritøkum at fáa virðismiklar royndir, ið kunnu vera avgerandi í royndini at vinna verkætlanir uttanlands. Samstundis er samstarv ikki óvanligt í byggivinnuni, og tí klára føroyskar fyritøkur saktans sjálvar at finna røttu samstarvsfelagarnar, um tað skuldi verið neyðugt.

Føroya Handverksmeistarafelag heldur tað vera púra burturvið, at P/f Eysturoyar- og Sandoyartunnilin hevur valt ein norskan ráðgeva at standa fyri forprojekteringini. "Arbeiðið varð ikki so mikið sum boðið út, sum almenni innkeypspolitikkurin nágreiniliga ásetur, og sum greitt varð staðfest frá politiskari síðu" sigur Magnus Magnussen formaður í Føroya Handverksmeistarafelag.

Tað tykist ikki sum tunnilsfelagið kennir sína samfelagsligu ábyrgd. "Hetta átti at verið ein íløga í føroyskar førleikar. Tey vilja vera við, at man ikki hevur førleikarnar í Føroyum, men hvussu skal man nakrantíð fáa hesar førleikar, tá eitt alment føroyskt partafelag ikki bjóðar arbeiðið út, soleiðis at føroyskar fyritøkur í minsta lagi hava møguleikan at bjóða uppá arbeiðið?" spyr Magnus Magnussen.

Hann heldur at hetta er eitt sera prinsippielt mál, tí talan er um størstu byggiverkætlan í Føroya søgu. "Tað er als ikki nøktandi, at tunnilsfelagið ikki vísir føroyskum fyritøkum ta virðing, at vit fáa møguleikan at bjóða uppá arbeiðið. Tunnilsfelagið og tað almenna annars skulu halda seg burtur frá at meta um, hvat vinnan er før fyri og ikki. Teirra uppgáva er at skapa forteytir við at skipa fyri útboðum og m.a. tryggja, at útboðini eru á føroyskum máli," sigur Magnus Magnussen.